StÍF-VÍF 19-20 (10-15):

# Hat-trick til strandingar



*Tað var fyrst og fremst gott verjuspæl og framúr málmansspæl, sum tryggjaði StÍF samlaða sigurin í VÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Meira spennandi enn tað sama verður tað neyvan. Strandingar tryggjaðu sær luttøku í triðju steypafinaluni á rað, tá teir við minst møguliga muninum sendu VÍF úr kappingini mikukvøldið**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN
*Jákup Mørk*

Tað var fyrst og fremst framúr verju- og málmansspæli í seinna hálvleiki at takka, at StÍF nú triðja árið á rað er við í pottinum, tá steypafinalan í føroyskum manshondbólti skal leikast.

Steypavinnararnir tey bæði seinnu árini hava betri enn nakar annar duga at sett kílar í hjá VÍF, og mikukvøldið fingu teir so enn ein av slagnum, tá tað eydnaðist at senda vestmenningarnar úr kappingini.

Marginalarnir hesa ferð vóru tó teir minst møguligu. StÍF hevði vunnið fyrra dystin í Vestmanna við einum máli, og støðan var júst hin øvugta hesaferð. Munnurin var tó tann, at meðan VÍF skoraði 20 mál, nú teir vunnu sín útidyst, so fekk StÍF 24 mál í sigrinum í Vestmanna, og sambært reglunum fyri Coca-Cola kappingina, so telja mál á útivølli meira, um talan er um samanlagdan javnleik eftir tveir dystir.

## Einvegis

Tað sá annars leingi svart út hjá heimaliðnum á Skála mikudagin. Hóast kavarok og ring koyrilíkindi kundu hugsast at hava darvað fyrireikingunum, so løgdu gestirnir fyri sum eitt óløgi.

Verjan hjá strandingum, sum annars plagar at vera grundarlagið undir eyðkenda kvika álopsspælinum, tóktist als ikki at rigga so væl, sum hon vanliga ger, og var tað ikki fyri Marian Cirloganescu, sum alt fyri eitt fann stórspælið fram, so kundi dysturin væl funni sína avgerð longu hesar fyrstu minuttirnar. Í verjupartinum var StÍF fullkomuliga uttan vanligu dýpdina. Roynt varð við ágangandi spælinum, sum hevur tryggjað liðnum heiðursmerki seinnu árini, men tá neyðugi uppbakningurin í hesum als ikki var til staðar, so høvdu vestmenningar ikki stórvegis trupulleikar av at spæla Piti Negru upp til skot, og fær stóri rumenin hjá vestmenningum frið at skjota, so verður tað ikki gjørt órevsað.

Ótryggleikin í verjuspælinum hevði eisini hug at forplantað seg í álopspartinum, har strandingar fleiri ferðir høvdu óneyðug bólttap, soleiðis at VÍF fekk lætt spæl við nøkrum kontraálopum, og tó at spælið hjá strandingunum sum heilt batnaði, so tóktist eingin vend vera í eygsjón. Maskinan hjá VÍF, har fyrst og fremst Daniel Rápa tóktist vera krumtappurin, var snøgt sagt komin ov væl ígongd. ferð eftir ferð varð strandaverjan tagað sundur av elegantum Rápa-innspælingum, og so við og við komu eisnii hinir á liðnum honum eftir. Við einum hálvskjúkum Inga Olsen og hálvskaddur Áka Olsen á beinkinum, varð byrðan enn einaferð løgd yvir á aðrar leikarar, og fyri tað mesta sýndust hesir at vera fullvæl vaksnir til uppgávuna.

## Vendu í verjuni

Fimm mál aftan fyri í steðginum sá ikki annað enn svart út hjá heimaliðnum, sum í øllum førum skuldi vinna fýra mál aftur, um vónir skuldu vera fyri einum finaluplássi. Hvat tosið hevur snú seg um í steðginum, ber illa til at staðfesta, men hetta gav í øllum førum liðnum stundir til at fáa nakrar lutir upp á pláss.

Og liðið var fullkomuliga hamskift, tá komið var útaftur. Í verjupartinum var talan nærum um eitt nýtt lið, sum fyrstu løtuna helt VÍF púrasta frá fatinum, og tá StÍF samstundis skoraði tríggjar ferðir á rað, kom brádliga spenningur í dystin.

Tvey mál frá VÍF mundu tó beint fyri øllum hesum, men strandingar góvu ongantíð skarvin yvir. Verjan var alla tíðina á kroppinum á mótstøðuni, og vunnu vestmenningar seg loksins ígjøgnum hesa, so stóð landsins besti málverji fyri teimum, og hann livdi so avgjørt upp til heitið.

Leingi stóð dysturin og ridlaði. Sluppu vestmenningar ikki framat í álopspartinum, so høvdu teir so avgjørt heldur ikki ætlanir um at lata strandingar sleppa upp í part, men ein hómin var tó av, hvat var í væntu. Ikki minst tí álopsspælið hjá VÍF gjørdist alt meira stirvið.





Kanska var tað sálarliga trýstið, sum fleiri fylgjandi StÍF sigrar í innanhýsis uppgerðunum hava ført við sær, sum gjørdi sína ávirkan, ella kanska var tað okkurt heilt annað. Hvussu var og ikki, so tóktist alt minni sannlíkt, at vÍF yvir høvur skuldi skorað. Áki Olsen varð sendur á vøllin í eini vón, at skotstyrki hansara kundi skjóta hol ígjøgnum væl virkandi mótstøðuverjuna, men heldur ikki hetta tóktist bøta nakað um, og spakuliga byrjaðu StÍF málini eisini at koma.

## Gysarin

Ljóðið í høllini gjørdist alsamt harðari. Stuðulin til heimaliðið tóktist ongan enda at taka, og tá Marius Joensen átta minuttir fyri leiklok minkaði munin í eitt mál, mundi troman í høllini lyftast nakrar sentimetrar uppfrá, og tá Jón Rasmussen í næsta álopinum javnaði, tóktist fagnaðurin ongan enda at taka.

StÍF var í hesi løtu í steypafinaluni, men VÍF gjørdi tó eina seinastu roynd. Gjøgnumbrot frá Inga Olsen og einmansavrik frá Daniel Rápa sendu teir aftur tvey mál framum, men tá Piti Negru stutt eftir varð sendur á beinkin seinastu tveir minuttirnar, var av álvara lagt upp til sannan gysara.

Tað eydnaðist StÍF at skora í sínum seinasta álopi. Men enn var ein minuttur eftir. Tað var eisini um reppið, at VÍF fekk gjørt sær dælt av hesum, men tvær reisur máttu teir ásanna, at StÍF eigur besta málverjan í landinum. Fyrst var hann fyri, tá John Zachariasen varð leiktur leysur á vonginum, og tá Áki Olsen í seinastu desperatiónini royndi skotstyrkina, stóð málverjin enn einaferð á rætta staðnum, og so var vunnið. Við tíggju sekundum eftir kundu strandingar longu byrja at fegnast, og so fyltast hallargólvið við kátum bygdafólki, tá seinasta ýlið úr klokkuni hevði ljóðað.

Triðja árið á rað er StÍF í steypafinaluni, og so er spurningurin, um talan eisini verður um reint hettrick í steypum. Hesa ferð er støðan kanska nakað øðrvísi, tí meðan strandingar tey bæði seinnu árini hava roynt seg móti liðum, sum í landskappingini hava staðið seg betri, so mugu strandingar smyrja seg við at vera favorittar, tá finaludysturin móti Kyndli verður á skránni.

Hvørt teir eisini megna hesa uppgávuna er so eitt annað mál, sum teir nú mugu fyrireika seg til. Fortreytin undan hesum var ein samlaður sigur á VÍF, og hendan vunnu teir so. Kanska við minst møguligu marginalunum, men ein sigur er ein sigur, og minstu marginalarnir eru ofta teir, sum útloysa størstu gleðina.

### Dysturin í tølum

**StÍF-VÍF 19-20 (10-15)**
Samanlagt 43-43. StÍF í finaluna eftir regluni um mál skotin á útivølli
Málskjúttar:
StÍF: Costin Dumitrescu 5(3), Alexandur Johansen 4(1), Artur Johansen 4, Jón Rasmussen 2, Marius Joensen 2, Andre F. Danielsen 1, Sveinur Justinussen 1
VÍF: Piti Negur 5, Ingi Olsen 4, Daniel Rápa 3, Ólavur Brimnes 3, Áki G. Olsen 2, Petur Fr. Joensen 1, Johnny Joensen 1
Brotskøst: StÍF 5, VÍF 1
Útvísingar: StÍF 1, VÍF 4
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen: Tóktust til tíðir at hava ilt við at finna innanhýsis stevið.



*Vestmenningar vóru vónbrotnir, og tað høvdu teir alla orsøk til at vera. Í 50 minuttir høvdu teir annað beinið í steypafinaluni, men teir máttu at enda ásanna, at aftur hesa ferð gjørdust teir akkurát ov stuttir at basa strandingunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Munurin var verjan



*- Nú minnist eg sjáldan sjálvur, hvussu dysturin hevur verið, men eg haldi eisini, at Marian gjørdi sítt, helt André eftir dystin, og tað mundi so ikki vera nøkur stór lygn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Maðurin aftan fyri avgerandi málið í dupultuppgerðini millum StÍF og VÍF, André F. Danielsen, helt eftir dramatisku semifinaluna, at tað fyrst og fremst var verjuspælið, sum hevði tryggjað StÍF sigurin**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at tað vóru nakrir glaðir strandingar, sum runnu runt á vøllinum í Ítróttarhøllini á Skála, tá dysturin móti VÍF var liðugur.

Ein teirra var André F. Danielsen, sum við seinasta málinum í dystinum tryggjaði StÍF finalusessin, og eftir dystin fingu vit orðið á hann.

## Marian gjørdi sítt

Tað er eingin loyna, at tað var framúr verjuavrikið í seinna hálvleiki, sum tryggjaði StÍF samlaða sigurin, og hetta var eisini tað fyrsta, sum André segði, tá vit eftir dystin spurdu hann, hvørjar lutir teir fingu broytt í steðginum.

- Tað var verjan. Vit tosaðu fyrst og fremst um at fáa verjuna at rigga betri, enn hon hevði gjørt fyri steðgin, og tað eydnaðist. Nú minnist eg sjáldan sjálvur, hvussu dysturin hevur verið, men eg haldi eisini, at Marian gjørdi sítt, og tað hevði so avgjørt eisini sína ávirkan.

- Tað skal tó leggjast afturat, at tað ikki bert vóru vit, sum vardu væl. VÍF verjan stóð eisini ótrúliga væl, og vit høvdu alla tíðina sera trupult við at spæla okkum ígjøgnum hesa. Tað sum kanska var avgerandi her, mundi vera, at Costin hevur spælt sera væl seinastu dystirnar, og at hann eisini gjørdi tað hesaferð. Men sum sagt, so var tað fyrst og fremst í verjuni, at vit komu aftur, segði André F. Danielsen at enda, áðrenn hann helt leiðina inn til veitslurómin í skiftisrúminum.